## VIÐMERKINGAR

# Kommunan fyri øll

**Jói Winther**
*Valevni hjá Javnaðarflokkinum í Tórshavnar kommunu*




### Anir

Gerð skommini til skammar
royn títt besta har tú er
ei góðska sinni lammar
men beiskleiki tað gerð

Hygg at barninum sum nemur
fylg teim gomlu kvøldarstund
hvat tú í lívi fremur
er fólksins lagda grund

Royn tú smíl og gleði geva
unn teim frið ið stetla á
turka tár úr syrgna eyga
tá skal eydnan verða hjá

**J. W. Flemish Cap 12/03-04**

# Komandi føroyska grundlógin eigur at tryggja øllum rættin til lív!

**Jenis av Rana**
*Løgtingslimur fyri Miðflokkin*



Fólkatingslimir, fjølmiðlafólk, og seinast tvær "danskar studinur í internationalum relatiónum", viðgerða í sambandi við fosturtøkuspurningin altjóða rættindi hjá kvinnum. M.a. vísa hesi til "rættin" hjá kvinnum at ráða yvir egnum likami, og meta at Føroyar hava skyldu at undirleggja seg altjóða konventiónir, heldur enn egnar lógir, ið eru evnaðar til eftir tí, sum her á landi verður hildið vera rætt.

Uttan í hesum sambandi at viðgera krav teirra, sum má metast at vera víðgongd generalisering, loyvi eg mær at vísa til- og minna á- at í altjóða høpi eru konventiónir og yvirlýsingar, sum eru ætlaðar at verja barnið í trygga móðurlívinum. Kendastar millum slíkar eru:

*Heimsyvirlýsingin hjá ST um mannarættindi( viðtikin 10 dec. 48).*

*Europeiska mannarættindarkonventónin( viðtikin 4. nov. 50), og*

*Barnarættindarkonventónin hjá S.T. ( viðt. í 89). Her verður m.a. sligið fast, at:*

...barnet, som følge af sin fysiske og psykiske umodenhed, har behov for særlig beskyttelse og omsorg, herunder passende juridisk beskyttelse, både før og efter fødslen.

Hvat við hesum fyriskipanum? Kunnu vit loyva okkum at síggja burtur frá teimum?

Sjálvandi ikki.

Gævið dagurin skjótt kemur, tá hvørt føroyskt fostur verður boðið vælkomið og frá fyrsta degi fær somu rættindi okkara millum, sum tey vit føddu njóta.

Tá verða Føroyar vælsignaðar framum!

Í Sálmi 139. ørindi 16 lesa vit: .. *meðan eg enn var fostur sóðu eygu Tíni meg, og í bók Tíni stóðu teir allir uppskrivaðir, dagarnir, ið ásettir vóru, áðrenn nakar av teimum enn var komin.*

Lat okkum á sama hátt, ið nýggju føroysku grund- ella stjórnarskipanarlógini, grundfesta fostrinum rættin til lívið- frá gitna og til náttúrligan deyða.

# Mentanarhús skal byggjast !

**Allan Hjaltalin**
*Valevni miðfloksins til Tórshavnar býráð*




Mentanarhús skal byggjast, har bæði tónleikur og list skulu hava góð kor at virka undir !

Vit hava so nógvar evnaríkar tónleikarar her í Tórshavnar kommunu, men karmarnir fyri einum tónleikaralívi eru syndarligir.

Um foreldrini ella tónleikarnir sjálvir ikki hava nóg stóran kjallara, hava teir sum so einki venjingarhøli. Um teir ikki eru nóg "stórir" at leiga eina ítróttarhøll at spæla í, hava teir sum so ongan møguleika at vísa fram síni kynstur.

Hetta skal eitt mentanarhús broyta. Vit skulu hava eitt mentanarhús við venjingarhølum, fundarhølum og spælihølum, har bæði tónleikarar og onnur listafólk kunnu møtast og vísa, hvør dygd býr í teimum.

Eg eri tónleikari sjálvur, og er hetta tí eitt av mínum hjartamálum. Gev mær tína atkvøðu við býráðsvalið '04, og eg skal gera alt fyri at fáa eitt mentanarhús, við øllum nútíðarkarmum, upp at standa her í Tórshavnar kommunu.

# Ungt blóð inn at tryggja framtíðina

**Heini Magnussen**
*Valevni hjá Fólkaflokkinum*

Tórshavnar Kommuna er væl stýrd, og neyvan er nøkur kommuna í landinum so væl fyri sum Tórshavnar Kommuna.

Langtíðarplanlegging, klókar íløgur og góð fólkaflokksleiðsla hevur gjørt, at Tórshavn kann bera sítt heiti sum høvuðstaður við upprættaðari pannu.

Vit ungu í Havn síggja væl positivu gongdina í býnum á flest øllum økjum. Vit ungu vilja fegin vísa ábyrgd og bjóða okkum fram at luttaka í og ávirka framtíðina so at hon betur passar okkara tíð og tá eisini betur til okkara eftirkomarar.

Tórshavnar kommuna er skuldarfríð kommuna. Sera umráðandi er, at vit eisini í framtíðini skipa so fyri, at kommunan framhaldandi er væl fyri fíggjarliga – og hetta gera vit best við at tryggja kommuni eitt trygt inntøkugrundarlag

Besta trygdin eru at kommunan tryggjar at vinnulív fær góðar karmar at virka undir, at vit hava eitt fjølbroytt handilslív, rúm fyri almennum stovnum og almennari umsiting.

Vit skullu soleiðis tryggja at Havnin hevur nóg mikið av grundøkjum til alt hetta, góðar vegir, góð havnaviðurskifti, nógv og reint vatn v.m.

Hesum vil Fólkaflokkurin virka fyri.




# Viva la republica banana Tórshavn

**Rubek Lilaa**



Nú má skil koma á! Undanfarna býráðssamgonga hevur ferð eftir ferð brotið byggisamtyktirnar og bygt, sum best ber til. Borgarin hevur staðið spurin, meðan bygningar hava stugið seg upp framman fyri stovuvindeyguni.

Skilaleysi byggipolitikkurin hevur ført við sær, at fólk hava sett búgv við skeivum fortreytum og tískil fingið sítt egna húsaviðrið lækkað.

At politiska leiðslan er farin fram við slíkum diktatoriskum arbeiðslagi, er ógvuliga ''beklagiligt" og hevur máa álitið undan kommunalpolitikkinum.

Tað er allneyðugt, at borgarin aftur fær álitið á politisku skipanina. Tí fari eg at arbeiða fyri politiskum reinføri og gjøgnumskygni í býráðsarbeiðinum. Borgarin eigur og skal hava at vita, hvat fyriferst í býráðinum. Politikarin skal tæna fólkinum við tign og ikki síni egnu reyv. Vel tí politiskt reinføri. Seti krossin við lista E, við meg.

# Demokrati

**Hanus Vang**
*Býráðs-Imperialisma*
*4. partur.*



Eg havi frætt undirhonds at Býráðið als ikki ætlar at svara spurningunum eg setti í triðja parti.

Tað undrar neyvan nakran, tá býráðið heldur ikki svarar tá lóg um alment innlit er galdandi, sambart Løgtingsins Umboðsmanni.

Meg undrar tað allarminst, tí Býráðið hóast nógv lyftir, ikki enn hevur svarað brævi frá Landsverki um vegristir frá 1987. Munadygt súltivekstað má sigast.

Soleiðis setur Býráðið seg eisini á hesum øki langt uppum galdandi lógir landsins.

Og tað sær út til at teir sleppa tað og alt annað. Hava vit onki kommunalt eftirlit?

Stakkals tær bygdir íð hava kropið undir býráðs"stýrið".

Teir meta helst ikki at tað er neyðugt at svara jaligum spurningum frá borgarum íð ikki eru samdir við teir um hvussu býarvøksturin eigur at verða.

Men fólkaræðið eigur at vera munandi víðari enn eitt hálvt sekund fjórða hvørt ár.

**SPURNINGAR til VALEVNI**

Av tí at farandi Býráð ikki svarar vil eg royna at spyrja tey valevni íð vænta at manna komandi Býráð, um hvussu tey halda at Havnin eigur at vaksa?

Og halda tit at bóndagarðurin í Hoyvík skal leggjast niður?

Vil tú royna at menna fólkaræðið í kommununi og lata borgarin luttaka í málsfyrireikingum?

-----

Vónandi verður komandi Býráð betri enn tað sum verið hevur, sjálvt um úrvalið fyri tað mesta er nakað skurvut.

Eitt orðatak sigur at eitt fólk fær tað umboðan tað hevur gjørt seg uppibornan til, so valið kann gerast ein boomerang til okkum sjálvi.

-----

Av tí at eg í seinastuni havi skrivað eitt lítið sindur um vantandi fólkaræðisligan býráðspolitikk, og skilaloysið í býarvøkstrinum, eru tað nógv fólk íð halda meg vera valevni. Men so er lukkutíð ikki.

At fólk halda at ongin uttan valevnir skriva um kommunalpolitikk upp undir valið, má sigast at vera eitt prógv fyri demokratiskum undirskoti í Havn.

Fyribils endi.



# Álvarsligar skuldsetingar sum ongar próvførslur eru fyri

**Bjarni Djurholm**
*landsstýrismaður*



Í konjukturfrágreiðingini fyri oktober 2004 leggur Búskaparráðið harðliga eftir alipolitikkinum hjá Vinnumálaráðnum í síni heild og ákærir Vinnumálaráðið fyri ikki at hava tikið neyðug stig at seta í gildi tiltøk til smittuverju og handfaring av sjúkuraktu alingini.

Lagt verður fyri við at siga, at:

*– Í teimum trimum týdningarmestu útflutningsvinnunum eru í dag trupulleikar, sum millum annað stava frá politiskari misrøkt.*

Síðani verður alivinnan viðgjørd serstakt, og sigur Búskaparráðið (BR) millum annað:

1. *Eitt er at prísirnir falla og ILA sjúka kemur í fiskin. Men at tað skal ganga so long tíð til myndugleikarnir seta hóskandi reglur fyri vinnuna, ber brá av tí sama – at atlit meira verða tikin fyri teimum fyritøkum, sum rekavinnu, enn fyri vinnurakstur sum heild.*
2. *Um heystið í 2000 fekk landsstýrið eitt rimmar varskó í frágreiðingini frá norsku fyritøkuni Akvaplan, sum...... mælti til munandi minking í aldu nøgdunum eins og nágreinilig tilmæli um brakklegging og annan umhvørvisverndarligan atburð.*
3. *At henda frágreiðingin ikki fekk tær avleiðingar hon átti fyri alipolitikkin.*
4. *Ikki fyrr enn um nýggjársleitið í 2003 fekk Vinnumálaráðið sett í gildi nýggjar og herdar reglur...*
5. *...støðan við stórum arbeiðsloysi og húsagangi í hesi vinnu var partvís óneyðug, um stig vóru tikin sambært serfrøðingaávaringum..*
6. *Alt bendi á, at upplýsingarnar um umhvørvisstøðuna hava verið Vinnumálaráðnum í hendi longu á sumri 2000 – og kanska áðrenn tað.*

Skuldsetingarnar frá BR eru álvarsligar, samstundis, sum ongar próvførslur eru fyri niðurstøðunum.

Vinnumálaráðið (VMR) hevur tí gjørt frágreiðing um støðuna í alivinnuni farnu árini. Frágreiðingin lýsir greitt, hvussu illa grundaði sjónarmiðini hjá BR eru, og metir VMR tað vera átaluvert, at alment ráð uttan himpr ákærir politiskan myndugleika/ aðalráð fyri at misrøkja síni starvsøki, uttan at BR hevur ómakað sær at kanna veruligu gongdina í hesi strongdu vinnu. Samanumtikið hevur VMR hesar viðmerkingar til frágreiðinga hjá BR:

- at BR ikki vendi sær til VMR ella Veterinærdeildina áðrenn álvarsligu skuldsetingarnar í frágreiðingini,
- at BR vevur saman umhvørvisvernd og sjúkuniðurberjing,
- at BR nýtir tilráðingarnar í AkvaplanNiva (APN) frágreiðingini skeivt, umframt at BR brúkar umhvørvisstøðuna í alibrúkunum sum grundarlag fyri sínum atfinningum á veterinæra økinum,
- at BR ikki tekur støðu í, at øll alibrúk leingi hava verið umhvørvisgóðkend.
- at øll kryvjivirki eru eisini umhvørvisgóðkend,
- at úrslitið av av fyrireikandi arbeiðinum á umhvørvisøkinum, íroknað APN-kanningini var, at HS fann leist við støði í markvirðum at regulera umhvørvisárini eftir,
- at HS síðani 2001 javnan hevur steðgað alibrúkum, orsakað av dálking ella vantandi botnkanningum, og harvið hava mong aliøki síðani ligið brakk,
- at tað kann vera skoytt uppí, at umhvørvisparturin av HS og harvið APN var/er ábyrgarøki hjá landsstýrismanninum i umhvøvismálum,
- at kunngerðir á veterinæra økinum hava verið í mong ár, og at síðani 2001 eru hesar lógir og kunngerðir settar í gildi:

1. Ll. nr. 16 frá 23.02. 2001 um djórasjúkur, íroknað ILA (um fyribyrging og niðurberjing av sjúkum hjá djórum og um marknaeftirlit við djórum og djóraúrdráttum).

Sum setti úr gildi:

a) Lov nr. 36 af 28.02. 1908 for færøerne om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme hos husdyrerne m.m., sum seinast broytt við Ll. nr. 110 af 29.07. 1995, og
b) Ll. nr. 26 frá 30.04. 1987 um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum, sum seinast broytt við Ll. nr. 87 frá 28.05.1996.

2. K. nr. 106 frá 03.07. 2001 um minimumstiltøk í sambandi við niðurberjing av ávísum sjúkum hjá akvakulturdýrum, íroknað ILA.
3. K. nr. 113. frá 15.08. 2001 um sølu, inn- og útflutning av akvakultur-dýrum og -úrdráttum.
4. K. nr. 72 frá 26.07.2002 um sóttreinsing av frárensluvatni frá akvakultur-brúkum og akvakulturvirkjum v.m.

Som setti ur gildi:

a) K. nr. 96 frá 12.11.1991 um sóttreinsan av lívrunnum burtur-kasti, skolivatni og blóðvatni frá alivinnuni.

5. K. nr. 98 frá 08.07. 2003 um flutning av akvakulturdýrum v.m.

Sum setti úr gildi:

a) K. nr. 105 frá 03.07. 2001 um flutning av akvakulturdýrum v.m.

6. K. nr. 130 frá 23.12. 2003 um niðurberjing og eftirlit við ILA (Infectious salmon anaemia, ISA).

Sum setti úr gildi:

a) K. nr. 97 frá 8.07.2003 um niðurberjing av ILA (Infectious Salmon Anaemia, ISA),

Sum setti úr gildi:

b) K. nr. 98 frá 12.06.2001 um niðurberjing av ILA (Infectious Salmon Anaemia, ISA).

7. Kunngerð nr. 131 frá 23.12.2003 um sjúkufyribyrgjandi rakstur á alistøðum.

***Umframt reglur, ið hava verið ella eru klárar at fara til hoyringar:***

8. Uppskot til kunngerð um niðurberjing og eftirlit við ILA (Infectious salmon anaemia, ISA).

Sum kemur í staðin fyri:

a) K. nr. 130 frá 23.12. 2003 um niðurberjing og eftirlit við ILA (Infectious salmon anaemia, ISA).

9. Uppskot til kunngerð om koppseting móti ILA.
10. Uppskot til kunngerð om niðurberjing og yvirvøku af VHS og IHN í akvakulturbrúkum.
11. Uppskot til kunngerð um niðurberjing og eftirlit við BKD (Bacterial Kidney Disease).
12. Uppskot til kunngerð um sjúkufyribyrgjandi rakstur av lívfiskastøðum.
13. Uppskot til kunngerð um sjúkufyribyrgjandi rakstur á smoltstøðum.

Harumframt hevur Vinnumálaráðið/Veterinerdeildin síðani 2001 gjørt fleiri enn 10 kunngerðir, m.a. um innflutning av djórum og animalskum produktum, innaneftirlit, non-food produkt v.m. í sambandi við veterineravtaluna frá 2001 millum Føroyar og ES.

- at VESO frágreiðingin, sum varð almannakunnug í november 2001, gjørdist grundarlag fyri framhaldandi arbeiðinum fyri broyttum og nýggjum kunngerðum á aliøkinum, og at tað tí er beinleiðis villleiðandi at siga, at VMR ikki fyrr enn við árslok 2003 setti í gildi nýgjar og herdar reglur.
- at VESO frágreiðingin ikki nevnir, at tað er neyðugt at minka um framleiðsluna av alifiski fyri at fyribyrgja smittu.
- at VMR hevur nýtt norsku fyrimyndina í fyribyrging av ILA, sum varð mett at vera samanrenning av tí veterinert forsvarliga og fíggjarliga møguliga.
- at Heilsufrøðiliga Starvsstovan í 2000 skipaði fiska- og djórssjúkudeild,
- at fíggjarar av alivinnuni og vinnan sjálv, umframt viðtiknu karmarnar, hava gjørt veterinerar metingar, áðrenn fígging í hvørjum einstøkum føri er veitt alarum.
- at VMR bert kann gita um, hvørt skotska handfaringin av ILA hevði munað betur hjá okkum, enn nýtta norska. Fullkomin "skotsk" hevði lagt alla alingina lamna,
- at ólukkuliga støðan í alivinnuni er orsakað samanrenning av nógvum óhepnum umstøðum,
- at sjúkstøðan í alivinnan gjørdis eitt satt hóttafall og at vinnan í longri tíð hevur selt fyri undir framleiðslukostnað, og at tað soleiðis gjørdist álvarsligur steinur omaná byrðu fyri vinnuna,
- Føroyar hevur sum fyrsta land í august 2004 fingið eina ES góðkenda tilbúgvingarætlan fyri ILA og eina ES góðkenda ætalan fyri koppseting móti ILA. Hetta merkir, at til ber at koppseta smolt á vári 2005.
- osfr.

Omanfyrinevndu viðurskifti lýsa margfaldnið í viðurskiftunum í alivinnuni.

Vónandi gevur yvirlitið, saman við frágreiðingini eina fatan av, hvussu veruliga gongdin í umsitingini innan aliøkið hevur verið farnu árini.

*Framhald av síðu 11*

synning. Lat hann fara um allan sjónarringin!!!!!

Eg meini við, at ikki nýtist okkum at finna uppá alt sjálvi, men eiga heldur nýta góðar royndir frá øðrum og laga tær til okkara viðurskifti, bæði við fíggjarligum og landafrøðiligum atliti. Vit hava fáar og smáar eindir, sum liggja spjaddar landafrøðisliga. Hevði ikki verið skilagott at skipa ein felags pall fyri allar útbúgvingarnar? Leggja vit í dag nóg stóran dent á, at vit eiga at útbúgva fólk til eina produktiva vinnu? Hava vit tey útbúgvingartilboðini, sum eru viðkomandi fyri Føroyska samfelagið? Her er ríkiligt at tríva í.

**Gransking**

Síðani komi eg til granskingina. Eisini her er stór signalørkymlan. Eg eri samd við landsstýrismanninum í fíggjarmálum, tá hann førir fram, at best er at savna allar játtanir til gransking á einum stað, so mest fæst burtur úr. Tað frøddi meg eisini, tá løgmaður bar hetta sjónarmið fram og eftir míni fatan játtaði, at nú skuldi vend koma í. Menn gakk, orð og orð og ongin handling. Vónbrot. Um politiskur vilji var til staðar, eru amboðini til at samskipa granskingina longu tøk.

Vit hava granskingarráð og granskingargrunn, sum hoyra undir mentamálaráðið. Teirra játtan er skorðin við 800.000 kr. í mun til 2003. Hetta er ein skerjing upp á 12% í sama andaleypi, sum øll tingmanningin eins og landsstýrismenn ásanna, vilja, royna og hava sæð ljósið við miðvísari vinnugransking. Her er so stór andsøgn, at tað gest rætt og slætt margháttligt. Men tað er ikki nóg mikið við tí. Vinnumálaráðið hevur sett av til granskingarlund, sum tað so fínt eitur, 500.000 kr.

Fiskimálaráðið hevur ikki færri enn tríggjar granskingarkjarnar hvør við sínum deildarleiðara, og omaná teimum einum samskipara. 3,45 mió. kr. Hvussu í allari verðini skal hetta kunna menna nakra vinnu. Peningurin verður etin upp av berari umsiting.

Nei, tá landsstýrismenninir ikki megna at savna granskingina undir einum hatti, skal eg heita á fíggjarnevndina og tingmanningina hjá samgonguni um av álvara at fáa ruddað upp á hesum øki. Savnið peningin í Granskingargrunnin. Tað verða 8 mió. kr. samanlagt. Hetta er sjálvandi alt ov lítið, men nýta vit hugskotið hjá Finni Helmsdal, og ístaðin fyri at geva skattalætta til tey hægstløntu at nýta 30 mió. kr. til vinnugransking afturat hesum 8 mió. kr. Við tí kunnu vit siga, at vit eru byrjað at satsa.

Málið eigur sjálvsagt - innan eitt ávíst áramál, t.d. 10 ár - at vera tey 3% av BTÚ, sum onnur framkomin lond eisini nýta til gransking.

**Fiskivinnan**

Innan fiskivinnuna eru sjálvandi eisini nógvir tættir at viðgera. Henda fastlæsta skipanin við, at nærum øll framleiðsluvinnan innan flakaframleiðslu liggur sum ein sera stórur almennur klumpur, har skipanin í sær sjálvum ger hann ódynamiskan og menningartarnaðan. Skal føroysku flakavinnuni vera lív lagað, er neyðugt at broyta skipanina við almennu ognini í henni. Stig eiga at verða tikin til at sundurliða Framtaksgrunnin, soleiðis at einskiljingin av ognunum kann byrja - ongantíð ov skjótt.

Nevndi í gjár undir hvørjum treytum ætlanin var at veita stuðul til rækjuvinnuna, men eg vil endurtaka tað her í beinleiðis spurningi til landsstýrismannin í fiskivinnumálum: Hvørjar treytir er ætlanin, at rækjuvinnan skal lúka, áðrenn hon fær skattaborgarans pening? Eru tankar gjørdir um ognarviðurskifti, eginpeningsviðurskifti, virði í flotanum, avkast o.s.fr.?

Í staðin fyri at stúra fyri kreppu, gerið so heldur hóttanarstøðuna til ein møguleika. Gerið nøkur ítøkilig vinnupolitisk átøk, og Tjóðveldisflokkurin vil til fulnar stuðla hesum. Her er nóg mikið at taka til. Lat meg nevna nøkur:

- Vinnugranskingin
- Útvegan av veiðimøguleikum aðrastaðni
- Loftvegis fiskaflutningur
- 70.000 t. svartkjaftur sum gjald fyri veiðimøguleikar býtt til alla vinnuna, og ikki sum studningur til 4 reiðarí
- vinnuráð ella hugskotsbanki
- útflutningsgrunnur til marknarføring av føroyskum tónleiki
- ígongdsetarastuðul
- einskiljing av almennum ognum

Farið til verka! Vit vilja vera við til at gera hóttan til møguleika.